Sunnudagur 21. oktober

SVF

14.00 Hundalív á Rhodos - donsk sending
14.30 Hin lítla prinsessan - am. filmur frá 1939
16.00 Møti úr Betesda í Klaksvík
17.00 Gentan Tippi og djórini í Afrika - náttúrusending
17.40 Oggy og kakkulakkarnir - teknifilmur
18.00 Carola í Afrika - norsk sending
18.30 Gloymdar leikur 10
18.40 Jumanji 26
19.05 Emily á Veðurgarðinum 2
19.50 Andakt við Elisabeth Joensen
20.00 Vesturleiðin til Vínlands
20.50 Føroyingar loysa - hvat sigur søgan? Sjúrður Skaale og Rolf Guttesen
21.20 Bornholms stemme - danskur virðisløntur filmur
23.10 Bókatátturin - enski rithøvundurin A.S. Byatt
23.40 Liðugt

EUROSPORT.com

04:15 Motorcycling (Live)
05:30 Motorcycling (Live)
06:45 Motorcycling (Live)
08:15 Motorcycling
09:15 Motorcycling
10:45 Motorcycling
12:00 Motorcycling
13:30 Super Racing Weekend(Tm) (Live)
16:30 Tennis
17:45 News
18:00 Rhythmic Gymnastics
19:30 News
19:45 Nascar
21:15 News
21:30 Rally
22:00 News
22:15 All Sports
22:45 Tennis
23:45 Rally
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

0.30 TLZ: »Ever Wondered?«
0.55 TLZ: »Mind Bites«
1.00 TLZ: »Art – A Question of Style
1.30 TLZ: »Chardin and the Still Life«
1.55 TLZ: »Cyberart«
2.00 TLZ: »Wild Moves«
2.30 TLZ: »Restoring the Balance«
2.55 TLZ: »Mind Bites«
3.00 TLZ: »Sex and the Single Gene?«
3.30 TLZ: »Missing the Meaning?«
3.55 TLZ: »Bites – Science Bites – Knots and Bugs«
4.00 TLZ: »Looking Glass World«
4.25 TLZ: »Mind Bites«
4.30 TLZ: »Picasso's Guernica«
4.55 TLZ: »Mind Bites«
5.00 TLZ: »The Arch never sleeps«
5.30 TLZ: »The Chemistry of the Invisible«
5.55 TLZ: »Bites – Science Bites – Invisible Worlds«
6.00 Toucan Tecs: »Up In the Air«
6.10 Monty the Dog: »Monty at the Library«
6.20 Playdays: »The Roundabout Stop«
6.40 Smart on the Road: »Jersey«
6.55 Toucan Tecs: »Potty Pirates«
7.05 Monty the Dog: »Monty at the Supermarket«
7.10 Playdays: »The Whybird Stop«
7.30 The Really Wild Show: »Pets«
8.00 Top of the Pops Prime
8.30 Totp Eurochart
9.00 Top of the Pops 2
9.30 Top of the Pops Classic Cuts
10.00 Kitchen Invaders
10.30 Real Rooms
11.00 Going for a Song
11.30 Style Challenge: »Oliver Skeete«
12.00 Ground Force: »Churchdown Gloucester«
12.30 Last of the Summer Wine: »Next Kiss Please«
13.00 Eastenders Omnibus
13.30 Eastenders Omnibus
14.00 Eastenders Omnibus
14.30 Eastenders Omnibus
15.00 Grange Hill Omnibus
16.00 Jonathan Miller's Opera Works: »The Chorus«
16.45 Cardiff Singer of the World 1997
17.25 Lesley Garrett Tonight
18.00 Great Antiques Hunt: »Tenby«
18.30 Fawlty Towers: »The Builders«
19.00 The Boss: »Truly Bradley Deeply«
19.30 Porridge: »Heartbreak Hotel«
20.00 Murder most Horrid: »Girl from Ipanema«
20.30 Very Important Pennis
21.00 Shooting Stars
21.30 All Rise For Julian Clary
22.00 Big Train
22.30 Aristocrats
23.30 Doctor Who: »The Caves of Androzani«

BBC WORLD

0:00 BBC News
0:30 This Week (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Zero Gravity: A Space Requiem (r)
3:00 BBC News
3:30 Correspondent (r)
4:00 BBC News
4:30 This Week (r)
5:00 BBC News
5:30 Top Gear (r)
6:00 BBC News
6:30 Albania: Back From The Brink
7:00 BBC News
7:30 Clarkson's Car Years (r)
8:00 BBC News
8:30 Life (r)
9:00 BBC News
9:30 This Week (r)
10:00 BBC News
10:10 The Planets (r)
11:00 BBC News
11:30 Click Online (r)
12:00 BBC News
12:30 Zero Gravity: A Space Requiem (r)
13:00 BBC News
13:10 People's Century (r)
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:10 Dateline London
16:00 BBC News
16:10 The Firing Line (r)
17:00 BBC News
17:30 Holiday (r)
18:00 BBC News
18:10 The Planets (r)
19:00 BBC News
19:30 Zero Gravity: A Space Requiem (r)
20:00 BBC News
20:10 People's Century (r)
21:00 BBC News
21:30 Top Gear (r)
22:00 BBC News
22:30 Dateline London (r)
23:00 BBC News
23:30 Reporters
23:45 Asia Today

3

05:20 Børne-hjørnet med Disney
09:05 Skat - børnene er skrumpet(G)
10:00 Barnemad (7) (G)
10:30 Luftens helte (7) (G)
11:25 Alt under kontrol
12:25 Amors pile
13:20 Heksene fra Warren Manor(G)
14:15 Popular(G)
15:10 En chance til
16:05 Felicity (9) (G)
17:00 Harem 2001 (2) (G)
18:00 Onside: SAS Ligaen
19:00 Tve-kampen
20:00 Søndagsfilmen: Wild Things
22:05 Den der hævner
00:05 Lægerne
01:10 Strømere i familien
02:00 Sunset Beach (G)
02:45 Sunset Beach (G)
03:30 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur, Uni Næs, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan, Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
10.00 Tíðindi
10.05 Sunnudagsløtan, Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis.
10.30 Sálmar og sangir (e), Sálmar við heystardámi. Helena Samuelsen leggur til rættis
11.00 Fimti ára hátíðarguðstænasta í Elduvíkar kirkju, Hans Jacob Joensen, biskupur, prædikar og Uni Næs, prestur, talar.
12.30 Døgurðatónar
13.10 Vambarkonan, Jógvan Arge lesur 2. part av bók eftir Robert Joensen.
13.40 Friskt lot um fjallarød, Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindini
14.15 Trý korter við Bella Jóhann, Jógvan Arge hittir Jóhan Petersen, sum í mong ár búði í Norðdepli. Seinna sending.
15.00 Kvøðuljómar
16.00 Fólk og frítíð (e), Gunnar Nolsøe leggur til rættis
17.00 Leyst & fast (e), Hilmar Jan Hansen prátar við fólk og spælir tónleik.
18.00 Tónasláttur, Hans Egholm stílar fyri
18.30 Tíðindi
18.40 Ítróttatíðindi
19.00 Aftur til Múla, Triðja sending. Studio Pegasus leggur til rættis
20.00 Partita, Sending við tónleiki og tíðindum av føroyska og útlendska tónleikapallinum. Ove Olsen og Edward Nyholm Debes leggja til rættis.
22.00 Liðugt

Rás

09:45 Orðið, Bibliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Gospeltónleikur
13:00 Kelduvaðið (EvR), Osvald Kjærbo talar um "Kristus í Hebrearabrævinum" (5. partur)
14:00 Føroyskir sangir og sálmar
15:00 Tónleikur
16:00 Barnarásin (EvR), Hesaferð við luttøku úr Havn
16:30 Tónleikur
17:00 Ymiskt á leiðini (e), Endursending frá týsdegnum. Sjómanssending v/ Malmberg Olsen
18:00 Tónleikur
20:00 Kelduvaðið (EvR), Endursending frá kl. 13.00 í dag. Osvald Kjærbo talar um "Kristus í Hebrearabrævinum" (5. partur)
21:15 Orðið (e), Endursending frá í morgun, Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

Radio Luna

09.00 Byrjan - Dagsskrá
09.05 Lovsangur
09.30 Barnalindin, beinleiðis sending úr studio A, vertur Lív Jacobsen
10.00 Okkara dagliga breyð
12.00 Møti v/ Jørgen Christiansen og Jens Peter Petersen frá krossferðini í Klaksvík
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin (e)
15.00 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
16.00 Teldan velur løg.
17.55 Dagsins orð, eftir Svenning av Lofti.
18.00 Blandaður norðurlendskur og føroyskur gospiltónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 Møti v/ Jørgen Christiansen og Jens Peter Petersen frá krossferðini í Klaksvík
22.55 Dagslok, Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast

Fimti ára hátíðarguðstænasta í Elduvíkar kirkju

ÚF Sunnudagin kl. 11.00

Í mongum føroyskum bygdum vóru bønhús í katólskari tíð. Ein av hesum bygdum hevur helst verið Elduvík, tí har er eitt pláss sum eitur á Bønhúsgarðinum. Ikki fyrrenn umleið 400 ár eftir trúbótina, í 1951, fekk Elduvík aftur kirkju, sum arkitekturin H.C. W. Tórgarð teknaði, og sum sett varð á Bønhúsgarðin. Heini Eldevig og Martin Nónskarð smíðaðu.

Nú sunnudagin hátíðarhalda Elduvíkingar kirkjunnar fimti ára dag við guðstænastu, har Hans Jacob Joensen, biskupur, prædikar og sóknarpresturin, Uni Næs, talar.

Trý korter við Bella Jóhann

ÚF Sunnudagin kl. 14.15

Tá Jóhann Petersen og hansara menn á "Føroyinginum" skuldu fara úr Føroyingahavnini suður í Ravnsoynna í juli 1952, var nógvur ísur. Teir lógu eina heila viku umborð á "Marité" í Grátufjørðinum, og vóru síðani nakrar dagar saman við bóndunum í Fiskanesi. Komnir suður í Ravnsoynna, fóru teir út aftur at jaga eina ísbjørn, sum var sædd á eini oyggj. Hetta var ein størri bardagi, sum Jóhann ger nógv burturúr.

Aftur til Múla

ÚF Sunnukvøldið kl. 19.00

Fólkini í Múla eru nú komin til mikudag. Hetta er triðja sendingin í røðini um tær familjurnar, sum í eina viku liva og virka í útdeyðu bygdini norðuri í Múla. Hesaferð hoyra vit millum annað um, at prestur fær undantaksloyvi til at fara til Klaksvíkar til briðarvígslu. Hann veit bara ikki, hvussu hann sleppur til Klaksvíkar. Tvey nýggj fólk koma til bygdina, familjurnar lesa úr dagbókini, og Freydis Poulsen heldur fram við frásøgnini um Guttorm í Múla. Í sendingini finna vit eisini Múla Giant. Sunnukvøldið klokkan 19.00.

Studio Pegasus leggur til rættis.

Vesturleiðin til Vínlands

SVF Sunnukvøldið kl. 20.00

Í sendingini sigla vit túsund ár aftur í tíðina, og leggja inn í víkina, har Leivur Hepni tók land í Vínlandi. Í fjør summar vóru teir tríggir føroyingarnir Páll Poulsen, Leif Niclasen og Zacharias Hammer staddir í Nýfundlandi. Hetta var júst á 1000 ára haldinum fyri at Leivur Hepni við sínum monnum kom til Vínland og reisti búgv norðaliga í Nýfundlandi — í dag nevnt Leifsbúðir. Teir tríggir vitjaðu hetta søguliga pláss. Í dag síggjast leivdirnar eftir gomlu búsetingini hjá norðbúgvunum, eitt stórt víkingasavn er bygt á staðnum og eini langhús við úthúsum er reist í sama sniði sum gomlu víkingalonirnar. Eitt víkingaskip siglur við ferðafólki á víkini uttan fyri Leifsbúðir. Í samband við 1000 ára haldið hevur kanadiska stjórnin latið byggja eina lítla víkingabygd.

Í sendingini fer Leif Niclasen, sum er fyrrverandi skipsførari, at greiða frá, hvussu víkingarnir kundu sigla longu leiðina um Norðurhøv uttan klokku, kumpass og logg. Páll Poulsen, ið hevur stóran áhuga fyri søgu og ferðunum hjá gomlu norðbúgvunum, greiðir frá ferðini hjá Leivi Hepna til Vínlands og øðrum søguligum tilfari um víkingarnar, tá teir tóku land í Grønlandi og Vínlandi.

Lagt til rættis: Zacharias Hammer. Fotografur: Zacharias Hammer, DR. Klipt: Bjarnheðin í Hoyvík og Zacharias Hammer.

Turrskødd av Smyrli

Smyril fær nú ísetta bjargingarútgerð, eins og hini skipini hjá Strandferðsluni. Um illa vil til, so skal kortini vera gjørligt at koma turrskøddur av skipinum. Talan er um kostnaðarmikla útgerð, men um krøv, ið skulu lúkast

BJARGINGARÚTGERÐ
Dagfinn Olsen

Herfyri fekk ferðamannaskipið Ternan ísetta bjargingarútgerð, ið hevur við sær, at fólk kunnu koma turskødd av skipinum, skuldi verið neyðugt at nýtt rýmingarvegirnar í skundi.

Hetta er nýggj og framkomin útgerð og í fjølmiðlum sóust millum onnur stjórarnir á Strandferðsluni royna útgerðina við góðum úrsliti.

Smyril hevur hea vikuna avlýst dupult túrar til Suðuroyar, tí útgerðin verður nú sett í umborð á Smyrli.

Útgerðin gongur undir heitinum turrskødd bjarging. Smyril lá mikudagin á Havnini og arbeitt varð við at seta upp útgerðina.

Kostnaðarmikið

Á Smyrli sæst, at ovarliga á skipinum er útgerðin sett niður á slætt, við kassa um.

Magnus Magnussen á Strandferðsluni sigur, at talan er um somu útgerð, sum umborð á Ternuni, bert annað merki.

Tvær hosur eru á hvørjari síðu av skipinum. 4 bátar eru á hvørjari síðu. Fólk verða so leidd upp, har útgerðin er. Síðani verða hosurnar skotnar út, so fólk kunnu fara ígjøgnum tær niður í bjargingarbátarnar, sum liggja og bíða, tveir og tveir. Ein við hosuna og annar beint uttanfyri. 430 fólk kunnu fara á hvørjari síðu av Smyrli.

Hetta er kostnaðarmikil útgerð. Útgerðin umborð á Smyrli kostar eini 4 miliónir. Tá er ein bátur eisini við. Talan er um trygdarkrøv til ferjur, ið taka bilar, so útgerðin verður sett í Ternuna, Smyril, Sam og Dúgvuna. Í alt kostar hetta eini 10 milliónir krónur.

Ætlandi verður útgerðin umborð á Smyrli royndleygardagin.

Smyril lá mikudagin á Havnini og arbeitt varð við at seta upp útgerðina, ið gongur undir heitinum turrskødd bjarging

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Tónleikasamtakið Grót skipar saman við Sprotanum og Tutl fyri forkunnugum tiltaki í Gøtu. Café, livandi tónleikur, bókasøla og fløgusøla, alt undir somu lon. Fløgurnar fáast fyri hálvan prís

(Mynd: Jonhard Hammer)

Grót, fløgur og bøkur í Gøtu

Hefyri gavst Tutl við at selja fløgur. Tónleikasamtakið Grót í Gøtu hevur loftað hesum og skipar fyri áhugaverdum og hugnaligum tiltaki, har til ber at ogna sær lesna frá Sprotanum og tónleik, afturvið livandi tónleiki og caféhugna

MENTAN
Dagfinn Olsen

Grót í Gøtu er virkið felag. Felagið skipar hesa vikuna fyri tiltaki í Losjuni í Gøtu, saman við Plátufelagnum Tutl og Sprotanum, ið fæst við bókaútgávu. Talan er um sølu av bókum og fløgum, ið fgara fyri hálvan prís, og um livandi tónleik og café.

Tiltakið lat upp mikudagin kl. 19.00 og er eisini opið fríggja- og leygardagin frá kl. 15.00 til 23.00.

Meira útgávuvirksemi

Tiltakið er komið í lag eftir at Tutl herfyri gavst við handilsvirkseminum og gjørdi av at leggja meira dent á útgávuvirksemi í staðin. Teir sótu eftir við hópi av fløgum, utlendskum eins væl og føroyskum, ið teir nú lata frá sær fyri hálvan prís.

Grót og Tutl hava samstarvað um ymiskt, og gjørdu av í felag at hava eina stóra útsølu í Gøtu í heystfrítíðini. Tá hetta var komið i lag, tosaðu Grót og forlagið Sprotin saman, og komið var á samt um, at upplagt var at selja bøkur í sama viðfangi. Sostatt spurdist eitt forkunnugt tiltak burturúr: café, livandi tónleikur, bókasøla og fløgusøla, alt undir somu lon.

Tað er ókeypis at vitja innar í Losjuna hesar dagarnar.